## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Val millum hugsjónir

**Jógvan Sundstein**



Stutt síðani møtti eg kendum føroyskum andstøðupolitikkara í floghavnini í Kastrup. Vit hava áður arbeitt rættiliga nógv saman í politikki. Hann sigur eitt sindur háandi við meg: "Tú roknar væl framvegis við, at fullveldi verður veruleiki." Eg svaraði ja, at tað gjørdi eg. Aftursvarið eg fekk var: "Jógvan, tú ert tann mest romantiski persónur, eg nakrantíð havi kent." Mítt svar var, at tað var eg glaður fyri at hoyra, men eg kundi bara ikki siga tað sama um hann. Hann hevur seinastu 2-3 árini brúkt meginpartin av síni orku at forða fyri, at Føroyar fingu síni sjávsøgdu rættindi við sjálvræði.

Sami maður hevur um dagarnar grein í bløðunum í sambandi við fókatingsvalið. Hann sigur, at valið er eitt val um hugsjónir. Hugsjónirnar, ið verða settar upp ímóti hvørja aðrari eru: tjóðskaparligt frælsi og menniskjansligt frælsi. Formaður Javnaðarflokksins vil gera tað til, at teir ið ynskja og arbeiða fyri tjóðskaparligum frælsi hjá einum fólki ikki hugsa um tað menniskjansliga frælsi og vælferðina hjá einstaklinginum.

Einki kann vera skeivari enn hetta. Øll fólk og allar tjóðir ynskja at ráða sær sjálvum og taka ábyrgd av sínum egnu viðurskiftum. Í allar flestu førum hevur hetta eisini við sær, at fólk individuelt eisini fáa tað betri enn, um tey ikki høvdu tjóðskaparligt frælsi. Hin vegin kunnu fólk eisini fáa tað fíggjarliga gott, um onkur annar rindar fyri tey. Men tá hava tey ikki frælsi, heldur ikki menniskjansligt frælsi. Eingin, sum bert tekur ímóti, uttan at hava gjørt nakað fyri tað, hevur persónligt frælsi. Tað verður mangan sagt, at tann, sum er niðurbundin í skuld, hevur mist frælsi, tí lánveitarin hevur tikið tað frá honum. Hesin kann kortini royna at rinda skuldina aftur og harvið gerast frælsari. Hinvegin er tann, sum livir av, at annar rindar fyri hann uppaftur meiri ófrælsur, um hann heldur, at hetta er ein góð varandi skipan, sum hann einki ger fyri at broyta.

Føroyingar standa í dag á einum vegamóti. Í skjótt farna løgtingsvalskeiði hevur landsstýrið arbeitt fyri størri sjálvbjargni og fingið samtykt eina greiða ætlan fyri sjálvstýri Føroya fólks. Komandi fólkatingsval fer at geva eina ábending um fólkið á komandi løgtingsvali fer at taka undir við hesi ætlan.

Arbeiðið hjá núverandi landsstýrissamgongu hevur bøtt nógv um flestu samfelagsøki, og sjálvstýrisætlanin ber í sær, at Føroyar í framtíðini kunnu skipast sum eitt gott, sterkt og liviligt samfelag. Um ikki verður tikið undir við sjálvstýrisætlanini, hendir eingin bati, og land okkara verður bert meira heft at øðrum landi, og endin verður, at vit heldur ikki kunnu taka avgerðir um okkara gerandisdag.

Fólkaflokkurin hevur havt leiðsluna í verandi samgongu. Fólkaflokkurin hevur verið samskiparin og semjarin av sjálvstýrisætlanini. Fólkaflokkurin hevur tí eisini uppiborið tykkara stuðul á fólkatingsvalinum hin 20. november.

# Ongin føroysk rødd er á Fólkatingi – Bert tveir føroyskir pamparar

**Jákup Fróði Djurhuus**



Fólkatingsmaður Javnaðarfloksins rósar sær av, at hann ongantíð hevur verið inni í hølinum hjá danska javnaðarflokkinm. Hann skuldi skamma seg.

Fólkatingsmaður Fólkafloksins hevur skapa so nógv rumbul í donskum innanríkispolitikki, at hann hevur skatt umdømi hjá vanliga føringinum í Danmark.

Og báðir eru løgtingsmenn.

Fólkatingsmaðurin og formaðurin í Føroyabólkinum Peter Duetoft bað teir lata vera við at sita bæði í løgtingi og fólkatingi. Tí teir kunnu ikki røkja bæði størvini. Duetoft hevur so púra rætt. Hetta er tað, sum danir við einum beinraknum men ljótum orði, kalla pamparavirksemi.

Hetta eru nakrar góðar orsøkir til at tveita hesar báðir út úr fólkatinginum tann 19 novembur við fuld musik, um tú vilt stuðla Ríkisfelagsskapinum væl og virðiliga.

So hvørt samferðslan Føroyar og Danmarkar ímillum er batna - so hvørt samskifti Føroyar og Danmakar ímillum er batna - so hvørt er sambandið ímillum føroyskar og danskar politikarar versna.

**Flúgva til Danmarkar í dag - heimaftur í morgin**

Orsøkin er einføld. Teir møta ikki í fólkatinginum meginpartin av tíðini. Teir trekkja bara løn. Flúgva til Danmarkar í dag - heimaftur í morgin.

Starvið verður ikki røkt við teirri tign sum skal til, og verður heldur ikki virt sum eitt fulltíðarstarv. Tað vísir uppstillingin til fólkatingið.

Løgmaður stillar upp! Varaløgmaður stillar upp. Landstýrismenn stilla upp. Og løgtingsmenn stilla upp.Vit vita frammanundan, at ongin teirra hevur tíð ella møgulleika til at røkja starvið sum fólkatingslimur.

**Lumpa veljaran**

Teir stilla upp fyri at lumpa veljaran at velja seg, soleiðis at teir kunnu nýta henda týdningarmikla fólkatingssess í einum heimligum politiskum talvi.

**Velji, sum eg**

Eg velji bert tann persón til fólkatingið á sambandslistanum, sum frammanundan lovar mær, at hann ætlar sær at røkja fólkatingsarbeiði sum eitt fulltíðarstarv. Hann skal lova mær, at hann fer til Danmarkar at tala føroya søk.

At hann sigur øll onnur álitisstørv frá sær.

At hann allatíðina er tilstaðar í fólkatinginum

At hann nýtir eitthvørt høvi at greiða frá um føroysk viðurskifti

At hann virkar sum ein ambassadørur fyri Føroyar ímillum danskar fólkatingslimir

At hann býtir ymiskt léttlesiligt tilfar út til danskar fólkatingslimir og fjølmiðlar við sakligum tilfari um Føroyar, og allatíðna er tilreiðar at greiða frá um Føroyar og føroysk viðurskiftiTað er einasti máti at byggja uppaftur eitt gott og virðiligt samskifti Føroyar og Danmarkar ímillum.

Fólkatingsvalið:

# Føroyskar finnur leypa borg

**Katrin Dahl Jakobsen**



Tað er umráðandi, at tað umboð, sum kallar seg hin føroyska røddin veruliga kennir og virðir hesa rødd. Hvør er hin føroyska røddin, og hvat sigur hon, um so var, at hon slapp til orðanna? Hvat hevði hon sagt á teirri fólkaatkvøðu, sum okkum var lovað? Hesin møguleikin varð tikin frá okkum, tí samgonguni manglaði dirvi, erligheit og virðing fyri egnum lyftum.Tey tordu ikki!

**Flyta trupulleikan**

Nú ætla hesi somu, at gerast føroyskar finnur á Fólkatingi. Nú skal telvast víðari og Fólkatingið vera pallur um tað, tey kalla fullveldisstríðið. Men hvar er stríðið, um so er, at tað er? Er tað ikki heima hjá okkum sjálvum og ikki á Fólkatingi? Í mai í ár varð samtykt á Fólkatingi, ikki bara av stjørnini, at føroyingar sjálvir avgera sína framtíð. At flyta trupulleikan niður á Christiansborg er, skulu vit halda okkum til spælireglur í talvi, ikki annað enn at leypa borg. Hetta verður gjørt langt aftaná at danir hava bjóðað remi, og leikur var lokin, um so var, at dirvi var at taka av hesum.

At trýsta, trútta og leika í á Fólkatingi um nakað, sum føroyingar ikki vilja vita av, er at vanvirða føroyingin.

**Samstarv og loysnir**

Javnaðarflokkurin vil hava samstarv, sum hava loysnir við sær og ikki klandur og stríð. Um tað ríkisrættarliga mugu vit sjálvandi fyrst av øllum semjast um heima hjá okkum sjálvum. Alt annað er tvætl. Ta semjuna megnaði samgongan ikki at fáa í lag. Helst tí, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eru besta trygdin fyri, at einki hendir, og alt verður við tað gamla. Hesir báðir sita á hvør sínum boðskapi, sum við árunum eru vorðnir so mikið forkálkaðir, at verðin í teirra eygum er bara svørt ella hvít.

Javnaðarflokkurin hugsar ørðvísi. Vit vilja við fólkatingsumboðanini arbeiða fyri, at vit koma burtur úr naggatódnini og burtur úr samanbrestunum millum føroyskar og danskar myndugleikar og fram móti loysnum, sum eru í tráð við fólksins vilja.

Vel tí Javnaðarflokkin, sum í øllum lutum vil seta fólkið fyrst!

# Landsmenn okkara í Danmark

**Jóhan Petur Johannesen**
*Valevni sambandsflokkisins*

Tað eru ikki so fáir av okkara landsmonnum, sum búgva í Danmark, annaðhvørt tí tey vilja búgva har, ella tí tey vinna sær kunnleika á ymsum skúlum. Tí er tað ikki so løgið, at tað til tíðir, verður neyðugt, hjá einum fólkatingsumboði, at leggja seg út í innahýsismál í Danmark, eitt nú tá ið tað ræður um hægri læristovnar, sjúkrahús og onnur viðurskiftir sum ávirka føroyingar sum annaðhvørt eru- ella ætla sær til Danmarkar.

Tað verður altíð so at føroyingar fara at flyta niður til Danmarkar í longri ella styttri tíðarskeið.



## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Móttøka

**Ása undir Kletti**

Hetta dragandi, lokkandi gandakenda orðið, sum sæst í bløðunum við jøvnum millumbilum. Hetta orðið, sum knappliga fær so ómetaliga stóran týdning. "Móttøka verður millum 15.00 og 17.00 fyri samstarvsfeløgum, viðskiftafólki, vinum og øðrum". Inni á elektroniska kalendaranum stendur gandorðið og blunkar. Gott at verða mintur á eitt so álvarsligt mál. So snildisliga er skipað fyri, at kalendarin aftur og aftur sigur" Minst til móttøku í dag". Snilt, Snilt. Dugi ikki at ímynda mær, at bíðað verður so leingi, so kalendarin av sínum eintingum skiftir boðskap: "Tú mundi gloymt móttøkuna". Ikki, tá tað snýr seg um gandaorðið. Hugsi eina løtu um, hvørji tey eru, sum koma undir hesa so vælsignaðu kategori og so trúliga møta, tá kalendarin kallar.

Besti Armani ella Boss klædningurin verður kekkaður kvøldið fyri. Hondseymaðu Gucci skógvarnir verða pussaðir, og skjúrtan er nýstrokin og so broyskin sum eitt nýbakað rundstykki frá Frants, so har er eingin trupulleiki. Slipsið verður valt við nógvum umhugsni - fleiri verða tikin fram og løgd á bringuna, áðrenn tað sera týðandi slipsastigið verður tikið. Jú, tað bleiv tað gull/bláa ríputa silkislipsið frá Cardin hesaferð. Umráðandi er ikki at møta í sama slipsi sum til seinastu móttøku. Og ikki at gloyma Calvin Klein boksarashortsini. Jú, tey eru eisini nýstrokin! Alt er sum tað eigur at vera.

Stóð og eygleiddi eitt slíkt tiltak nú ein dagin. Átti kanska at verið farin inn sjálv - eg var eisini eitt slag av samstarvsfelaga, og mín sann, um eg ikki eisini var fyrrverandi granni og skyldfólk hjá ánaranum. Kriteriini vóru so avgjørt í lagi, men hinvegin, so helt eg ikki, at mínir sóljugulu Viking gummistivlar (teir til gott) og fjøsuta, dálkaða joggingsettið, eg var í henda fríggjadagin, hevði ordiliga gjørt seg millum allar hasar øgiliga fínu og hugfarsligu garparnar, sum tyrptust heilt út í tún. Nei, nei. Tað fór aldri at ganga.

Grundaði eisini djúpt um, hvar konurnar og børnini hjá øllum hesum álvarsligu, skundmiklu yvirfrakkakløddu monnunum vóru. Kom heilt skjótt til eina logiska niðurstøðu. Tær vóru sjálvandi í SMS, eftir at tær høvdu heintað tey smáu í vøggustovum/barnagørðum/skúlum! Fríggjadagur var, (hvussu ber tað til, at móttøkur altíð eru fríggjadagar?) og hvat var meira praktiskt, enn at gera alt um eina leið? Konan fór til handils at gera tað heilt stóra fríggjadagsinnkeypið við børnunum, og garpurin, ja, hann fór til móttøku.

Ein lítlan tíma aftaná hava tey hitst aftur á parkeringsøkinum. At øll hillin við Smarties fór út eftir gólvinum, og at dreingirnir skutu til máls við víndrúum, so eitt heilt víndrúutyssi endaði á høvdinum á einari eldri konu, og at tann 5 ára gamla dótturin ikki vildi sleppa einari eskju við MARS og til seinast setti seg á eskjuna, tað eru jú bara slíkt, ið kann henda, tá ein er til handils. Einki at tosa um. Tað hendir alla tíðina. Á ja. Í næstu viku er kanska aftur ein móttøka. Livst so spyrst. Vit síggast! (til móttøku).

# Samstarv ella konfrontatión

**Dan R. Petersen**
*løgtingsmaður*



Nationalisma livir ikki uttan konflikt. Verður konfliktin loyst, fer grundarlagið undan nationalismuni. Tí noyðist tjóðveldisflokkurin alla tíðina at hava sínar fíggindar; veruliga ella fyrigyklaðar.

Tá samgongan byrjaði, var lag á manni. Væl hevði Høgni Hoydal slóðað fyri við síni famøsu bankasending, so væl at hann í takkarløn var borin inn á ting og fekk formanssessin í tjóðveldisflokkinum í lønomaná. Nationalisman kókaði. So var farið til verka, og reypið var nógv. Hvítabók, svartabók og optimisma.

Við tí stóra bankaendurgjaldinum fór nakað av gassinum úr tí nationalistisku ballónini. Og tá ið eitt stórt sæð samt fólkating samtykti, at Føroyar fingu loysing tann dag, fólkið ynskti tað, var eisini grundarlagið farið undan samgonguni.

Tá ið H.H. nú sigur, at hann skal á danating at slóða fyri fullveldinum, so heldur hesin pástandurin ikki. Frá dønum fáa vit fullveldi, tá føroyingar sjálvir ynskja tað. Problemið hjá H.H. liggur heima hjá okkum sjálvum. Hann torir ikki at spyrja fólkið. Hann veit, hann fær nei.

Við dyggum upplýsingararbeiði frá javnaðarflokkinum er undirtøkan fyri loysingini komin niður á 37%. Bert ein stórur triðingur av fólkinum vil tað, sum Høgni vil. Tað er hansara stóra problem. Tað er í føroyum, at samgongan skal vinna slagið um loysingina. Og hetta slagið er tapt. Tapið viðurkendu teir, tá teir ikki tordu at geva borgaranum fólkaatkvøðuna 26. Maj, sum honum var lovað.

Men 20. november sleppur fólkið at tala. Tá fáa vit ta fólkaatkvøðuna, okkum varð noktað í vár.Tey, ið haldað, at henda samgongan hevur gjørt eitt gott arbeiði senda sjálvandi Høgna og Óla á danating at klandrast víðari við danir og hvønn annan. Men tey sinniligu, tey ið ynskja loysnir við samráðingum heldur enn við konfrontatión, velja sjálvandi ein javnaðarmann.

# Okkara Land

**Anita á Fríðriksmørk**
*tjóðveldisflokkurin*



**Niður við Tjóðveldisflokkinum og vel samband**

Tað er av sera stórum týdningi, at vit fáa gjørt upp við ta ónøgd, sum er viðvíkjandi manglandi statsrætti føroyinga.

Tað vísir seg, at allir flokkar á tingi siga seg vilja broytingar:

Sambandsflokkurin vil broytingar undir donskum yvirræði, sigur hann, hóast ongin er førur fyri at siga frá, hvørjar broytingar talan er um.

Javnaðarflokkurin vil broytingar undir donskum yvirræði, sigur hann, - men er nakar førur fyri at siga frá, hvørjar broytingar talan er um. Hugsi ikki!

Hesir flokkarnir eru sum øllum kunnugt samdir í løtuni um, hvønn statsrætt vit skulu verða undir. Nemliga donskum yvirræði.

Tað er greitt, men broytingarnar frá núverandi støðu, og til hvørja broyting teir ynskja er øllum ógreitt.

Hóast hesa støðu í dag, var Javnaðarflokkurin samdur við okkum í 1998, tá ið teir søgdu seg vilja taka undir við síðu eitt í samgonguskjalinum, tað er tann síðan, sum snýr seg um fullveldi. So tað er ikki so løgið, um tey sjálvi, og vit onnur ikki vita, hvat tey meina.

**Arbeiða víðari við**

Men hvussu er og ikki, so mugu vit sláa fast, at tað sum hendan samgongan, og komandi fullveldissamgonga og umboð Tjóðveldisfloksins á Danatingi, fer at arbeiða víðari við, er:

At føroyingar skulu hava evsta vald og evstu ábyrgd yvir Okkara Landi.

At føroyingar viðurkennast sum tjóð. Hetta er danska stjórnin ímóti, tí teir siga at í danska ríkinum er ein tjóð, og tað er tann danska.

At móðurmál okkara verður viðurkent sum tjóðarmál okkara

At føroyingar fáa eitt virðuligt samband við danir.

At føroyingar fáa betri atgongd til útheimin.

Hetta eru alt viðurskifti, sum eru so sjálvsøgd, men sum ikki kunnu gjøgnumførast, uttan so, at tann sum stríðist fyri hesum trýr uppá tað og vil at nakað skal henda. Viðkomandi skal so sjálvandi eisini tora at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst.

Hesi krøvini uppfyllir Tjóðveldisflokkurin, og bjóðar seg tí fram at arbeiða fyri Okkara Land niðri á Danatingi.

# Framtíð føroyinga stendur upp á spæl!

**Niklái Petersen**
*Fólkatingsvalevnið fyri tjóðveldisflokkin*

Tað er ógvuliga umráðandi, at øll tjóðveldisfólk fara á fólkatingsval hesu ferð, tí framtíð føroyinga stendur upp á spæl!

Vit hava eitt samt fólkating, ið hevur sett út í kortið, hvussu farast skal fram í øllum viðurskiftum viðvíkjandi føroyapolitikkinum.

Tá ein so upplivir ferð aftaná ferð, hvussu lítið nógvir av fólkatingslimunum vita um føroysk viðurskiftið, er tað ræðandi hvat úrslit kann spyrjast burturúr tílíkum viðgerðum.

Eg haldi okkara umboðan hesu seinastu árini, hevur verið ov nógv heft at politiskum flokkum og tískil ikki megna uppgávuna at umboða føroysk viðurskifti á fullgóðan og viriligan hátt.

Tak avrikini hjá teimum báðum føroyingunum, sum hava umboða Føroya land á danatingi seinastu setu. Hava teir tænt føroyskum tjóðskaparpolitiskum áhugamálum nóg væl? Hava teir talað at, tá ið danir á fólkatingsins røðarapalli hava vanvirt óreingiliga veruleikan, at føroyska tjóðin er til?

Tá ið til dømis andstøðuleiðarin Anders Fogh Rasmussen uttan atlit til føroyska fullveldisynskið, bara staðfesti, at Føroyar og Danmark hoyra saman.

Mótmæltu føroysku umboðini, tá ið stjórnarleiðarin Poul Nyrup Rasmussen misnýtti familjubond millum vanligar danskar og føroyskar borgarar til tess at kúga politiska frælsisynskið føroyinga?

Hvussu var, tá føroyingar vóru vigaðir í krónum og oyrum?

Jú - føroyskir politikarar hava rættiliga nógv at gera á danatingi, og tað er eingin ivi, at fara allir tjóðveldisveljarir á val, so far flokkurin umboðan á fólkatingið.

Fær tí á val og vel ein sterkan tjóðveldisflokk á danating!

Gott val.